Viðmerking frá Føroya Lærarafelag:

# Námsfrøðiligir fundir

*Arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti broytast so skjótt, sum ongantíð áður. Fyrr var ikki óvanligt, at børnini nýttu somu bøkur, sum foreldrini høvdu brúkt. Nú er hetta heilt broytt. Ferð eftir ferð hoyrir tú sum lærari, at næmingarnir gremja seg um, at foreldurini duga ikki at hjálpa teimum. Á ein hátt eru lærarar í somu skóm. Teir fáa nýggjar og øðrvísi bøkur - bøkur við innihaldi, sum partrvís er ókent. Alt hetta krevur, at lærarar mugu fylgja við, um teir ikki skulu "sovna".*

**Eftir áheitan frá Føroya Lærarafelag endurprenta vit greinar, sum hava staðið í Skúlablaðnum, sum herfyri varð sent í hvørt hús í landinum**



Námsfrøði er føroyska orðið fyri pædagogik, sum merkir læran um uppaling; men vanliga hugsa vit um uppaling og undirvísing. Tá ið vit hugsa um námsfrøðiligar fundir, meina vit við allar teir fundir, sum innihaldsliga eru so, at næmingar/lærar mennast betur. Sagt við øðrum orðum: Fundirnir hava til endamáls, at næmingarnir skulu

· trívast betur
· hava lættari við at ogna sær nýggja vitan
· hava lættari við at læra.

Lærarar skulu fylgja við í

· nýggjum fakligum innihaldi
· nýggjum tólum
· nýggjum frálæruhættum,

so eisini teir trívast betur.

**Ein farin tíð**

Onkur kann spyrja, er hetta nú neyðugt? Fyrr var einki sovorðið fjas við fundum av øllum handa slag, og næmingarnir dugdu minst líka væl, sum teir gera nú - ja, helst dugdu teir betur!

Innast inni - hjá summum ógvuliga langt inni - vita helst øll vaksin, at ikki er rætt at sammeta skúlan í dag við realskúlaskipanina. Tá sluppu bara tey dugnaligastu í realskúla, og hini noyddust so úr skúlanum. Fleiri vóru tey, ið gleddu seg til síðsta skúladag, bert fjúrtan ára gomul. Men framtíðarmøguleikarnir tá vóru helst betur uttan fyri skúlan. Skipini høvdu altíð brúk fyri einum ungum røskum dreingi, og genturnar fóru út at tæna, í handil ella arbeiða í fisk.

Hetta er alt ein farin tíð. Skipini sigla næstan mannleys. Krøvini til fiskaarbeiði av øllum slag eru sera strong. Heimini standa tóm - børnini fáa eina professionella røkt uttan fyri heimið.

**Mugu fylgja við**

Arbeiðs- og útbúgvingarviðurskifti broytast so skjótt, sum ongantíð áður. Fyrr var ikki óvanligt, at børnini nýttu somu bøkur, sum foreldrini høvdu brúkt. Nú er hetta heilt broytt. Ferð eftir ferð hoyrir tú sum lærari, at næmingarnir gremja seg um, at foreldrini duga ikki at hjálpa teimum. Tey siga børnunum, at hetta og hatta hava tey ikki lært, ella siga tey, at tey lærdu alt øðrvísi tá.

Á ein hátt eru lærarar í somu skóm. Teir fáa nýggjar og øðrvísi bøkur - bøkur við innihaldi, sum partrvís er ókent. Nýggj fólkaskúlalóg og broyttar kunngerðir.

Alt hetta krevur, at lærarar mugu fylgja við, um teir ikki skulu "sovna".

Fyri at fylgja við er neyðugt við fundum, styttri skeiðum og tilfari at seta seg inn í. Hesir fundir liggja altíð eftir skúlatíð, so tað eykaarbeiðið, ið stendst av hesum, er ikki so lítið. Men hetta er neyðugt, skal skúlin - og harvið alt samfelagið fylgja við í tí menning, sum er um meginpartin av knøttinum.

**Toymi og verkætlanararbeiði**

Nýggj evni ínnan skúlan er m. a. toymi og verkætlanararbeiði.

Toymi meinast við, at tveir/tríggir lærarar, ið hava ein flokk, regluliga hava fundir og ráðleggja undirvísingarinnihald og -gongd, bæði fyri alt árið, men eisini meira í smálutir einar tríggjar mánaðir fram.

Verkætlanararbeiði er tvungin setningur frá næsta skúlaári. Tá skulu næmingarnir gera eina uppgávu, sum er hóskandi í vavi. Hon er ikki partur av einari ávísari lærugrein, men skulu so nógvar "lærugreinar" sum møguligt takast við í uppgávuna. Álagt verður lærarum at ganga til hjálpar og leggja næmingunum lag á, meðan uppgávan verður gjørd. Á hendan hátt verða teir lærdir at byggja upp og gera eina uppgávu. Teir verða ikki kastaðir út í nakað, sum teir so mugu klára sum best - tað kenna vit frá miðnámsskúlum.

Alt hetta krevur, at lærarar seta seg inn í arbeiðið við at gera verkætlan, og tað verður sjálvandi gjørt eftir skúlatíð.

**Starvsfólkapolitikkur**

Landið gongur undan viðvíkjandi starvsfólkapolitikki. Í dag er bert ein spurningur um, nær skúlarnir fáa ein. Kommunuskúlin hevur í longri tíð arbeitt við at orða ein starvsfólkapolitikk, og hevur tað kravt eitt ótal av fundum, og nógv hevur verið at sett seg inn í. Júst nú verður arbeitt við "sorgarpolitikki", sum verður ein partur av starvsfólkapolitikkinum, tá ið hetta evnið er liðugt viðgjørt.

Einki er at ivast í, at foreldrasamarbeiðið og fundarvirksemið veksur, tá ið skúlaráð verða sett á stovn sambært nýggju skúlalógini.

## Ikki javnbjóðissettir

Stutt fyri jól stóð eitt svar ella ein viðmerking til eina grein av mær í Oyggjatíðindi 1. desember 1999. Tað var endurgáva av fyrstu av 6 smástyttum og smávegisbroyttum greinum, sum staðið hava í Dagblaðnum frá februar/mars 1995 og framhaldandi, 28 íalt, í Oyggjatíðindum til fyri tveimum árum síðani.

Trúgvi F. Guttesen sigur, at eg eri yrkymlaður um ríkisfelagsskapsmálið sum hann væl skilir, leggur hann aftrat, og at eg vil hava sambandskar, dansk sinnaðar føroyingar at flyta niður aftaná eitt fullveldi. Hetta seinasta ivist eg í er vent til mín, møguliga tjóðveldispolitikkarar. Eg helt annars, at ongin grund var til at ivast í at skrivarin er á loysingarsíðu. Eg haldi meg ikki hava sagt nakrastaðni í greinunum, at sambandskir føroyingar skulu flyta niður aftaná fullveldi, heldur ikki lagt upp til tað. Her skal eg leggja aftrat, at sjálvandi hava føroyingar, sum hava føroyskan bústaðarrætt somu rættindi, tí statsborgararætturin, ein skal til at tosa um, er danskur enn. Ongin serstakur føroyskur statur er.

Trúgvi F. Guttesen nevnir so eitt uppskot um samríki við Danmark í sama viðfangi, sum tosið um ørkymlanina um ríkisrættarligu viðurskiftini, so hann kemur næstan at siga, at eg skuldi kunnað tikið undir við tí. Tað geri eg ikki. Í uppskotinum, Sambandsflokkurin arbeiðir við nú, um Samríki, er onki nýtt hent frá støðuni frammanundan eins og í ríkisfelagsskapsuppskotinum hjá J. Eidesgaard fyri Javnaðarflokkin undir navninum Sjálvstýri. Hvørki brýtur við ríkisfelagsskapin, sum hann higartil er kendur. Hetta er eisini trupult, tí gera tey tað, skal sambandsflokkurin næstan til at uppleysa seg sjálvan. Javnaðarflokkurin skal til at taka frástøðu frá fyrru søgu síni, tí undir krígnum, serliga í 1946 og stovna flokkin á nýggjum grundarlagi.

Eisini sigur Trúgvi F. Guttesen, skilt við hetta, at eg skal hava skrivað í greinunum, at summir føroyingar síggja niður á aðrar orsakað av politiskari støðutakan á hvør sínari síðu í loysingarmálinum. Tað ljóðar sum um tað er í tí smáa í dagligdegnum, sum eg ikki minnist meg hava sagt, og er egnað til at láturliggera trupulleikan. Eg nevni hetta helst í samband við starvseting í tí almenna og alment líknandi størvum, har so nógv er goldið úr Danmark, so støðan til tað landið illa er undankomandi at hava týdning. Tað er ikki so nógv at síggja niður á sum at vit ikki eru javnbjóðissettir har. Skúlin er í flestu førum í Keypmannahavn ella Áarósa og øðrum býum niðri. Samskiftið har endar fyrr ella seinni hjá dønunum í danska statinum, um lagað skal verða fyri starvi.

Nú haldi eg, at eg eftir minni havi viðmerkt tað mest ella alt av tí, ið stóð í stutta stubbanum í Dimmalætting stutt inn í desember síðsta ár, endurtikið á síðu 2 í Sosialinum fáar dagar seinni.

**Keypmannahavn**
**27. mars 2000**
**Mannbjørn J. Jacobsen**

## Torgerð gevst við Áarvegin

*Eftir at hava selt sjálvgjørdar prýislutir úr silvuri á Áarvegnum í Havn í 10 ár pakkar Torgerð Suðuroy saman 1. apríl*

John Johannessen



Kendi føroyski silvursmiðjurin og skemtarin, Torgerð Suðuroy, letur nú aftur handil sín við Áarvegin í Havn.

Men Torgerð sigur tó, at hetta hvørki er orsakað av, at hon ikki orkar meira ella tí tað ikki gongst væl at selja lutirnar. Torgerð er uppsøgd, tí húsini við Áarvegin skulu seljast.

Tískil æltar silvursmiðjurin í Vági at halda fram at selja føroyskar gávulutir, prýði til føroyska búnan og annað føroyskt prýði í høvuðsstaðnum. Hetta verður í handlinum Sirri í Vágsbotni, har Suðuroyar Ullvirki selur føroyskar troyggjur í serligum nýmótans sniði.

Torgerð Suðuroy sigur, at nú handilin við Áarvegin í Havn letur aftur, fær hon betur stundir at klæða suttur, barnaskógvar og aðrar minniligar lutir fyri fólk. Hetta, sigur hon, hevur víkt fyri handlinum við á Áarvegin.



*Føroya Arbeiðarafelag setir nú hart ímóti hørðum:*

# Hótta við at leggja landið lamið næstu ferð tað fer at kava

*Landsverkfrøðingurin og Føroya Arbeiðarafelag eru ósamd um, hvussu nógv teir, sum rudda kava, skulu hava fyri tilkallivakt. Og nú er tolið við at vera uppi*



*Føroya Arbeiðarafelag hevur eitt dagligt stríð fyri at fáa almennar stovnar at geva verkafólki tey rættindi, tey eiga eftir sáttmálanum. Ingeborg Vinther heldur, at teir skuldu heldur gingið undan sum eitt gott fyridømi. Her er formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag avmyndað á aðalfundinum um vikuskiftið, har hon greiðir fakfelagsfólki frá onkrum*

Áki Bertholdsen

Næstu ferð tað fer at kava, kann tað væl henda, at alt landið verður lagt lamið.

Tí tá er tað ikki vist, at nakrir vegir fara at verða grivnir, og tað kann skjótt fara at leggja alla bilaferðsluna lamna.

Orsøkin til tað er, at ósemja hevur tikið seg upp ímillum Landsverkfrøðingin og Føroya arbeiðarafelag um lønina hjá teimum, sum rudda kava.

Og nú hóttir Føroya Arbeiðarafelag við at blokera alla kavaruddingina.

Tað vil siga, at næstu ferð, tað fer at kava, er tað ikki vist, at vegirnir grivnir og tað fer at fáa álvarsligar avleiðingar fyri alla ferðslu á landi í Føroyum.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag upplýsti formaðurin, Ingeborg Vinther, at tað er nakað síðani, at hendan ósemjan tók seg upp.

– Málið tók seg upp tá ið vit fingu at vita, at Landsverkfrøðingurin hevði sent Havnar Arbeiðsmannafelag eitt uppskot um, hvussu tilkallivaktirnar skuldu vera fyri arbeiðsmenn um alt landið, tvs, eisini fyri limirnar í Føroya Arbeiðarafelag.

– Vit tóku upp fund við Landsverkfrøðingin har vit átalaðu, at stovnurin hevði sent Havnar Arbeiðsmannafelag eitt uppskot um, hvussu tilkallivaktir hjá limunum í Føroya Arbeiðarafelag skuldi lønast, uttan at siga okkum frá, segði Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at Landsverkfrøðingurin er sinnaður at betala monnunum løn fyri tilkallivakt frá klokkan fimm til klokkan átta um morgunin.

Men hann vil ikki uttan víðari gjalda tilkallivaktfyri at hava menninar tøkar um kvøldið um kvøldið.

Lønin fyri tilkallivakt er 14 krónur um tíman gerandisdegar. Hinvegin eru viðurskiftini viðvíkjandi tilkallivakt um vikuskiftið eru fingin í rættlag.

Men verða menninir boðsendir til arbeiðis, fáa teir løn eftir sáttmálanum og tá fellur 14 krónurs-gjaldið fyri tilkallivaktina burtur, tí hetta gjaldið er bara fyri at vera tøkur.

Ingeborg Vinther sigur, at Føroya Arbeiðarafelag hevur kravt, at menninir fáa løn fyri tilkallivakt frá klokkan fimm til klokkan átta um morgunin og frá klokkan fimm um kvøldið, tá ið veðrið talar fyri tí.

Men fyribils hevur Landsverkfrøðingurin ikki viljað góðtikið tað.

Ingeborg Vinther sigur, at fæst hetta ikki í rættlag heilt skjótt, verður avleiðingin, at Føroya Arbeiðarafelag fer at kalla allar menninar, sum grivið kava til fundar.

Og har fer at verða avgjørt, at teir fara ikki aftur at grava kava, fyrrenn stovnurin er sinnaður at betala ta løn, sum tilkallivaktirnar, sum hann eigur

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at Landsverkfrøðingurin hevur fingið hesi boðini, men enn eru viðurskiftini ikki fingin í rættlag.

Eitt nýtt útspæl er komið frá landsverkfrøðinginum, men tað er ikki endaliga viðgjørt í Føroya Arbeiðarafelag enn.

Men Ingebortg Vinther leggur dent á, at tí er tolið við at verða uppi.



**Savnsmynd úr Hoyvíkar Skúla**

## Frægast at hava tey smáu heima

Áki Bertholdsen

Foreldrafelagið í Hoyvíkar hevur aftur havt fund um støðuna í fólkaskúlanum, nú lærararnir hava lagt arbeiðið niður.

Fundurin týskvøldið var fyri øll foreldur at børnum í skúla í Hoyvík og mesta prátið snúði seg um tað óskipaðu skúlagongdina, sum hevur verið í kjalarvørrinum á læraraverkfallinum. Og ikki minst varð tosað um tað ótryggu støðuna, sum børnini eru komin í eftir, at teir sáttmálasettu lærarnir fóru í verkfall.

Verkfallið ger, at børnini hava rættiliga nógvar frítímar inn ímillum og hesar millumtímarnar ganga tey fyri vág og vind tí lærararnir, sum eru til arbeiðis, hava ikki umstøður at ansa eftir børnunum.

Og tað dámar foreldrunum í Hoyvík lítið, tí skúlin liggur ein høvuðsveg við nógvari ferðslu, sum hartil gongur skjótt.

Endamálið við fundinum var at lýsa støðuna og, hvørjar avleiðingar hetta hevur fyri børnini, bæði viðvíkjandi undirvísing og tryggleikanum.

Bæði Undirvísingar- og Mentamálastýrið, Fíggjarmálastýrið, Lærarafelagið, Skúlaráðið og Barnaverndin í Havn vóru boðin við á fundin, men bara Skúlaráðið møtti. Lærarafelagið gav avboð, tí tað lá ikki fyri.

Á fundinum upplýsti foreldrafelagið, at Undirvísingar og Mentamálastýrið hevði ikki enn svarað áheitanini, sum felagið sendi 13. mars. Í áheitanini varð stýrið mint á, at tað hevði yvirumsjónina við skúlanum og heitt varð á tað um at ansa eftir, at galdandi reglar verða hildnar.

– At stýrið ikki hevur svarað má tulkast sum líkasæla og vit mugu spyrja, hvat fólkaskúlalógin er verd tá ið myndugleikarnir ikki taka hana í álvara, sigur foreldrafelagið.

Felagið sigur, at við verkfallinum er rættiligt óskil komið á undirvísingina.

Men mist undirvísing kemur ikki aftur, hugburðurin hjá børnunum mótvegis skúlanum verður niðurbrotin, uppmøtingin versnar og sostatt eisini áhugin og næmingarnir ganga fyri vág og vind í millumtímunum.

Foreldrini heita tí staðiliga á myndugleikarnar um at greiða ósemjuna, so at undirvísingin kemur í rættlag aftur.

Tey siga eisini, at trygdin hjá børnum er fremst í huganum og tey flestu foreldrini halda tí, at tað er frægast at hava tey smæstu børnini heima, sum støðan er.

## Almennir stovnar halda ikki sáttmálan

Áki Bertholdsen

Almennir stovnar eru blivnir herviligir at bróta sáttmálan við Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskiftið segði formaðurin, Ingeborg Vinther, at tað var ein alsamt vaksandi trupulleiki, at almennir stovnar bróta sáttmálan, tí tað kemur oftari og oftari fyri.

Hon heldur, at almennir stovnar skuldu heldur gingið undan sum góð fyridømi á fakfelagsøkinum og gjørt sítt ítarsta fyri at havt skipað viðurskifti á arbeiðsmarknaðinum.

Men tað gera teir ikki. Tí tvørtur ímóti taka mál seg javnan upp um almennir stovnar, sum bróta sáttmálan á ymsum økjum.

**Ungir leiðarar verri**

Ingeborg Vinther sigur, at hetta er ein nýggjur trupulleiki hjá Føroya Arbeiðarafelag, tí fyrr kom tað næstan ikki fyri almennir stovnar brutu sáttmálan.

Hon sigur, at hon dugir ikki rættiliga at siga.

–Møguliga hevur tað samband við politisku samgonguna sum situr, tí tað skerst ikki burtur, at trupulleikarnir eru nógv versnaðir tey seinastu árini.

Men hon heldur eisini, at hetta hevur samband við ættarliðsskiftið í almennum leiðarastørvum.

Tað tykist sum um teir yngru, væl útbúnu leiðararnir, sum eru komnir beint av skúlabonki í útlondum, og sum í dag yvirhøvur mynda teir almennu stovnarnir, eru nógv harðrendari at fáast við, enn teir gomlu, sigur Ingeborg Vinther.

Hon sigur, at tað tykist sum um teir sita hvør á sínum pávaveldið og stýra, uttan atlitið fyri teimum sáttmálum, sum eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum.

Formaðurin í Føroya Arbeiðarafelag sigur, at tað eru øll sløg av trupulleikum, sum taka seg upp ímillum almennar stovnar og Føroya Arbeiðarafelag.

– Eitt nú gongur tað strilti at fáa summar almennar stovnar at gjalda yvirtíð, eins og gjaldið til eftirløn og lívstrygging er ein trupulleiki.

Ingeborg Vinther heldur at tað er nógv fyri, at almennir stovnar betala upp í 8% til eftirløn og lívstrygging til summar bólkar í samfelagnum, men at teir samstundis ikki unna vaskikonum 3% til somu endamál.

Hetta er m.a. støðan hjá Toll- og Skatt í Vágum

– Samstundis ætla politikararnir at hækka sína egnu løn heili 70% í summum førum, sigur Ingeborg Vinther.

Hon heldur, at tað er ov galið, at tey skulu vera noydd til at stevna og leggja arbeiða niður fyri at almennir stovnar skulu geva verkafólki síni rættindi.

Hon leggur dent á, at tað er sera týdningarmikið, at fólk fylgja væl við at tey fáa síni rættindi og siga frá, tá ið almennir stovnar, einsvæl og privatir arbeiðsgevarar ikki vilja halda sáttmálan.